## CIA oyðilegði 92 upptøkur

Amerikanska fregnartæastan, CIA, hevur nú viðgingið, at hob hevur oyðilagt 92 sjónbandsupptøkur, sum vístu, hvuaau farið varð fram, tá yvirgangsmenn blivu avhoyurdir. CIA hevur fyrr viðgingið, at tvær upptøkur vóru oyðilagdar, men í einum brævi skrivar løgmálaráðið í Washington, at CIA hevur oyðilagt 92 upptøkur. Lagt verður afturat, at í løtuni verður kannað, hvørjar upptøkur talan er um. CIA sigur seg hava gjørt eftir einum dómaraúrskurði frá 2005, sum álegði fregnartænastuni at at beina fyri øllum upptøkum við fólki, sum hava verið fangar í Guantanamo.



## Fleiri kvinnur skúlastjórar

Fyri fyrstu ferð eru fleiri kvinnur enn menn skúlastjórar í íslendska skúlaverkinum. Broytingin hendi næstseinasta heyst, og nú eru 54 prosent av skúlastjórunum kvinnur, skrivar Vísir. Annars vísa hagtølini hjá íslendska skúlaverkinum, at seinasta heyst arbeiddu 7.858 fólk í íslendska fólkaskúlanum ella 232 fleiri enn eitt ár frammanundan. Hagstovan í Reykjavík sigur, at 85 prosent av teimum, sum arbeiða sum lærarar í fólkaskúlanum, hava læraraútbúgving. Av teimum, sum virka sum lærarar í Reykjavík, hava 92 prosent læraraútbúgving.

# Faroe Ship riggar av í Runavík

**Nógv betraða samferðslukervið seinastu árini saman við uppkeypi av øðrum fyritøkum hevur gjørt, at Faroe Ship nú bert siglir upp á eina havn í Føroyum, og annars koyrir vøruna út við bilum**

VØRUFLUTNINGUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, sigur, at munandi betraða samferðslukervið saman við uppkeypum av serliga Hera Thomsen, flutningsfyritøku, hevur ført til niðurleggingina av vørugoymslunum hjá felagnum kring landið*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tá Eimskip í 2004 keypti Skipafelagið byrjaði ein tilgongd, sum í dag hevur ført til, at felagið – sum fekk navnið Faroe Ship – nú bert siglir upp á eina havn í Føroyum.

Seinni eru fleiri uppkeyp komin aftrat, serliga keypið av flutningsfyritøkuni Heri Thomsen í 2006, og tað hevur so aftur ført við sær, at flutningsskipanin hjá felagnum er broytt frá plattaflutningi til bingjur við størri skipum. Vøran verður síðani flutt víðari til kundan við lastbilum.

- Samferðslukervið er vorðið so nógv betri seinastu árini, at tað tekur ikki meiri enn hálvan annan tíma frá Havnini og út til øll onnur støð í landinum. Suðuroyggin og Sandoyggin sjálvandi tengdar at ferjuflutningi, sigur stjórin í Faroe Ship, Jóhanna á Bergi.

Hetta hevur merkt, at tær goymslustøðir, sum felagið hevur havt kring landið, so við og við eru niðurlagdar, og nú er so túrurin komin til goymsluna í Runavík.

- Vit hava nú latið ta goymsluna aftur, og tað merkir, at tey trý starvsfólkini, ið har starvaðust, nú eru søgd upp, sigur Jóhanna á Bergi.

Seinastu dagarnar hevur tí verið riggað av inni í Runavík, men Jóhanna á Bergi sigur, at tey tó framvegis hava eina vørugoymslu í Søldarfirði, eitt sonevnt vøruhotell.

- Men annars er skipanin hon, at alt verður lagt upp í Havn, og síðani koyrt út til kundarnar herfrá, sigur Jóhanna á Bergi.

Hon vísi aftur, at hendan rationaliseringin stendist av altjóða fíggjarkreppuni.

- Hetta er ein tilgongd, sum hevur staðið við í longri tíð. Talan er einans um eina rationalisering í sambandi við tey uppkeyp, vit hava gjørt av øðrum flutningsfyritøkum, og tí sera góða samferðslukervi, vit hava í Føroyum í dag, sigur Jóhanna á Bergi.

Faroe Ship eigur bygningin inni í Runavík, har vørugoymslan var, og ætlanin hjá felagnum er nú at selja hann.

# Klárt at byggja í Nólsoy

**Í hesum døgum bjóðar Tórshavnar kommuna út grundstykkir í Nólsoy. Ætlanin er at gera níggju stykkir byggibúgvin, men tað er tengt at áhuganum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri**

ÚTSTYKKING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur tikið ógvuliga drúgva tíð at fáa nøkur grundstykki byggibúgvin úti í Nólsoy, men nú er so endiliga komið hartil, at klárt er at fara undir hetta arbeiði.

- Í dag er so at siga eingin bíðilisti eftir grundstykkjum í Nólsoy. Vit hava kannað listan og spurt okkum fyri hjá teimum, sum hava staðið á listanum, men eingin av teimum er í dag áhugaður, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Upprunaliga útstykkingin í Nólsoy, sum liggur omanog eystanvert nýggja barnagarðin í bygdini, umfataði umframt hesi níggju støku grundstykkini eisini útstykking til fleiri randarhús, men tann byggibúgvingin verður ikki framd í fyrstu syftu.

- Tá ein slík útstykking fer fram, verður samlaði kostnaðurin útroknaður, og síðani deildur út á talið av



*Tað er oman- og eystanvert nýggja barnagarðin, at níggju nýggj grundstykkir nú verða byggibúgvin*
*Mynd: Leo Poulsen*

grundstykkjum. Í hesum førinum verður kostnaðurin mettur til 560 krónur fyri fermeturin, sum er heldur lægri enn kostnaðurin vanliga er í sjálvum høvuðsstaðnum, sigur Heðin Mortensen.

Í lýsingum í bløðunum kannar Tórshavnar kommuna nú tørvin á grundstykkjum í Nólsoy, og tá tann tørvurin er greiður, verður støða tikin til, hvussu farið verður fram.

- Tað er klárt, at um eingin áhugi er fyri at byggja í Nólsoy, so er heldur ikki nakar tørvur á, at gera nøkur grundstykki byggibúgvin. Tað kostar jú altíð nakrar milliónir at gera økið byggibúgvið, og tað gevur onga meining at binda hesar pengar í nøkur grundstykki, sum eingin áhugi er fyri í løtuni, sigur Heðin Mortensen.

Arbeiðið at gera hesi níggju grundstykkini er boðið út, og tilboðini komin inn, so klárt er at skriva undir sáttmálan, men tað verður altso ikki gjørt, fyrr enn tørvurin er kannaður.

Freistin fyri at boða Tórshavnar kommunu frá áhuganum fyri einum grundstykki er 16. mars. Eisini skal ein bankaváttan fylgja við umsóknini, at keyparin hevur fíggjarliga orku at rinda fyri grundstykkið.

Eisini verður upplýst, at lutakast verður nýtt at luta grundstykkini millum áhugaðar keyparar.

- Hetta er púra vanligt. Verður talan um 20 áhugaðar keyparar til níggju grundstykkir, so er lutakast vanligt at nýta, sigur Heðin Mortensen.

Hann skoytir tó upp í, at fólk, sum framman undan standa á einum bíðilista, sjálvandi fáa fyrstarætt.